

*Formaðurin og næstformaðurin í Sjálvstýrisflokkinum, Helena Dam á Neystabø og Sámal Petur í Grund heilsast eftir valið. Helena fekk 62 atkvøður og Sámal Petur fekk 60*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Helena fyrsti formaður Sjálvstýrisfloksins

**Tað var ein tepur sigur, tá Sjálvstýrisflokkurin leygardagin valdi Helenu Dam á Neystabø til fyrsta formannin eftir nýggja bygnaði floksins**

FORMANSVAL
*John Johannessen*

Talan var um ein ógvuliga tepran sigur, tá Helena Dam á Neystabø seinnapartin leygardagin vann kampvalið um fyrsta formanssessin í Sjálvstýrisflokkinum, síðani bygnaðurin varð broyttur.

Valið stóð millum Sámal Petur í Grund, sum er formaður í tingbólki floksins, og landsstýrisumboðið, Helenu Dam á Neystabø.

Av teimum 122 atkvøðunum, sum valfeløgini, ting- og landsstýrisumboðini høvdu ræði á, fullu 62 til Helenu Dam á Neystabø og 60 til Sámal Petur í Grund.

## Virðir avgerðina

Frammanundan valinum høvdu bæði Sámal Petur í Grund og Helena Dam á Neystabø væntað sær at vunnið. Men hóast tað ikki eydnaðist Sámal Petur í Grund at vinna, er hann ikki misnøgdur.

– Eg virði avgerðina hjá veljarunum, og eg ætli mær at samstarva væl við Helenu Dam á Neystabø, segði eftir valið.

Helena Dam á Neystabø var sjálvsagt fegin um úrslitið, og væntar hon sær gott samstarv við flokkin og við Sámal Petur í Grund.

Sjálvstýrisflokkurin valdi eisini næstformann. Hetta varð gjørt eftir at formaðurin var valdur. Sámal Petur í Grund var einastur í uppskoti, og varð hann tískil valdur uttan atkvøðugreiðslu.


Vit rudda á brúktbilagoymsluni

Avheintingartilboð, vegna plásstrot t.d.

Ford Sierra aut. Sýn: 03/99
Árg.: 11/87 Km: 119.000
Prísuppskot: 15.000,- Nr.plátur: Nei

VW Passat Stc Turbo Diesel Sýn: 11/98
Árg.: 07/86 Km: 217.000
Prísuppskot: 15.000,- Nr.plátur: Nei
Diesel

VW Golf Sýn: -
Árg.: 86 Km.: 180.000
Prísuppskot: 5.000,- Nr.plátur: Nei

Isuzu Pickup Chassis Diesel Sýn: -
Árg.: 87 Km.: 104.000
Prísuppskot: 3.000,- Nr.plátur: Nei
Diesel

Nissan Cabstar Sýn: 12/98
Árg.: 04/88 Km.: 143.000
Prísuppskot: 3.000,- Nr.plátur: Nei

Opel Kadett Glasvan vøruvognur Sýn: 11/98
Árg.: 10/88 Km.: 153.000
Prísuppskot: 18.000,- Nr.plátur: Ja

Mazda 323 1,3 Panelvan vøruv. Sýn: 11/98
Árg.: 86 Km.: 86.000
Prísuppskot: 13.000,- Nr.plátur: Ja

Bilarnir kunnu síggjast á verkstaði okkara

Treytin er:
- at bilarnir skulu avheintast í tí standi teir eru.
- At bilurin er goldin og avheintaður í seinasta lagi fríggjadagin 19.jan. 2001 kl. 12.00.

BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35


# Løgtingið til verka aftur

**Eftir jólafrí í næstan ein mánað, kemur løgtingið í dag saman aftur. 27 mál liggja og bíða eftir at verða avgreiddd, og landsstýrið hevur boðað frá fleiri uppskotum, sum verða løgd fyri tingið í næstum**

TINGARBEIÐI
*Magnus Dam*

Fyrsta løgtingsfundurin í nýggja árinum verður klokkan 13.30 seinnapartin. Løgtingið hevur ikki verið saman síðani 21. desember, tó so at løgtingsnevndirnar hava havt fleiri fundir í nýggja árinum.

Í dag verður so fyrsti løgtingsfundurin, og fyrsta málið, sum løgtingið skal viðgera, er Schengen-samstarvið, sum Føroyar eftir ætlan skulu knýta seg uppí.

Høgni Hoydal legði málið fyri løgtingið beint fyri jól, og tað er eitt mál, sum hevur rættiliga stóran skund. Orsøkin er, at Danmark ætlar at fara uppí Schengen-samstarvið saman við hinum norðurlondunum tann 25. mars. Hetta hava norðurlondini avtalað, og Danmark fær ikki hildið hesa avtaluna, um løgtingið ikki ger skjótt av í hesum málinum. Danmark sleppur ikki uppí skipanina, fyrrenn Føroyar og Grønland hava avgreitt málið í ávikavist løgtinginum og landstinginum.

## Evropa uttan passeftirlit

Samtykkir løgtingið sáttmálan og broytingarnar í útlendingalógini, sum eru neyðugar, so kunnu føroyingar ferðast til næstan øll ES-londini uttan at vísa pass. Tað eru bert Bretland og Írland, sum ikki eru uppi í skipanini. Norra og Ísland verða eins og Føroyar og Grønland ikki limir í Schengen-samstarvinum, men tey knýta seg uppí skipanina 25. mars eins og Føroyar og Grønland.Tískil verður heldur ikki í framtíðini neyðugt at vísa pass, tá ið leiðin gongur til hini norðurlondini.

Schengen-samstarvið ber eisini í sær, at løgreglurnar í limalondunum og londunum, sum eru knýtt uppí skipanina, skulu samstarva meira enn í dag. Eitt nú skal gerast ein felags telduskipan fyri øll limalondini, har brotsmenn úr øllum limalondunum verða skrásettir.

## Úr at gera

Hóast løgtingið fekk rættiliga nógv mál frá hondini fyri jól, so liggja 27 mál og bíða eftir at verða avgreidd, nú løgtingið aftur fer til verka.

Tað seinasta málið, sum varð lagt fyri løgtingið fyri jól, var uppskotið hjá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum, um eina barsilsskipan. Uppskotið hevur elvt til drúgvt kjak, longu áðrenn tað varð lagt fram, og líkt er ikki til, at kjakið endar, nú málið er komið fyri løgtingið.

Onnur uppskot, sum eru eftir at avgreiða, eru uppskotið um at taka frágreiðingina hjá grein 19 nevndini til eftirtektar, og uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um at broyta heimastýrislógina, so føroyskt verður tjóðarmál í Føroyum.

## Brimil fyri tingið

Løgtingið fær helst úr at gera hesa komandi tíðina, og landsstýrið hevur longu boðað frá fleiri uppskotum, sum helst verða løgd fram í næstum. Tekin eru longu komin um fyrstu eykajáttanarlógina í ár, og eitt av teimum fyrstu málunum, sum løgtingið kann koma at taka støðu til, er eitt uppskot um at fáa ein enda á trætuni millum Fíggjarmálastýrið og manningina á nýggja vaktarskipinum Brimli. Sambært landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Karsten Hansen, røkist einki fyri einari samráðingarloysn, og tí verður málið kanska lagt fyri løgtingið hesa vikuna.

Landsstýrið hevur eisini boðað frá einum uppskotið um at seta hámark fyri, hvussu nógv einstaklingar og feløg kunnu eiga í føroysku alivinnuni. Meirilutin í samgonguni vil hava hámarkið sett til 20 prosent. Hetta málið tók seg upp, tá norska felagið Pan Fish bjóðaði sær at keypa stóran part av Havsbrún í Fuglafirði, og løgtingið sleppur helst at taka støðu til ognarviðurskiftini í alivinnuni ein av komandi døgunum.

# Samráðingarnar byrjaðar

**Samráðingarnar á embætismannastigi millum Føroyar og Danmark um nýggja sjálvstýrisleistin byrjaðu í Danmark fríggjadagin. Partarnir eru kortini sera varnir við at siga nakað um hendan fyrsta fundin teirra millum**

SJÁLVSTÝRISLEISTURIN
*Magnus Dam, Keypmannah.*
*John Johannessen*

Føroyskir og danskir embætismenn eru nú farnir í gongd við at snikka saman eina avtalu um framtíðar viðurskiftini millum londini bæði.

Eftir at politisku samráðingarnar slitnaðu í heyst, stakk landsstýrið eina nýggja kós út í kortið, og fríggjadagin sessaðust trý føroysk og trý donsk embætisfólk við samráðingarborðið í Keypmannahavn at røða um møguleikarnar at finna eina loysn á málinum.

Herluf Sigvaldsson, stjóri á uttanlandsdeildini í landsstýrinum, og Steen Ryd Larsen, skrivstovustjóri í Forsætisráðnum, vátta báðir, at fundur var teirra millum fríggjadagin, men stórt meira enn tað ber ikki til at fáa burtur úr embætismonnunum. Hvørgin vil siga nakað um málini, sum vóru á borðinum hendan fyrsta fundin. Partarnir hava avtalað at fara stillisliga fram, og hesa avtaluna halda báðir partar seg til. Heldur ikki vil nakar teirra siga, nær næsti fundur verður, og hvussu nógvir fundir væntandi verða millum partarnar.

## Avgreiðast í januar

Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur áður sagt, at samráðingarnar á embætismannastigi eftir ætlan skulu fáast frá hondini í januar. Eftir er so bert tann politiska staðfestingin av avtaluni millum partarnar.

Løgmaður ætlar at fáa í lag eina avtalu við danir um at broyta heimastýrislógina, so tað ber til at yvirtaka øll málsøki uttan ríkismál eftir einum føstum leisti, sum landsstýrið leggur til rættis. Harumframt er eisini meiningin at fáa í lag eina avtalu um at niðurlaga blokkstuðulin og leggja eina koyriætlan fram móti føroyska fullveldinum.

Meiningin er, at alt hetta skal fáast so skjótt frá hondini, sum møguligt, so tað ber til hjá Føroya fólki at taka støðu til koyriætlanina fram ímóti fullveldinum á fólkaatkvøðu í apríl. Skal hetta eydnast, hevur landsstýrið skund. Tí ein avtala um at broyta heimastýrislógina skal bæði samtykkjast av Fólkatinginum og Løgtinginum, og hetta er ein mannagongd, sum varir umleið eina mánað.

Men eydnast tað at fáa í lag eina avtalu við donsku stjórina, og eydnast tað at fáa Føroya fólk at siga ja til koyriætlanina á fólkaatkvøðuni, skulu føroyingar aftur til fólkaatkvøðu, tá blokkstuðulin er niðurlagaður og øll málsøki eru yvirtikin. Tá skal atkvøðast um eina føroyska grundlóg, sum staðfestir Føroyar sum fullveldi.



*Fríggjadagin vóru trý embætisfólk hjá Landsstýrinum í Danmark á fundi við embætisfólk hjá Forsætisráðnum um nýggja sjálvstýrisleistin. Fundurin var tann fyrsti higartil um nýggjá leistin*

*Savnsmynd*

## Samráðst leingi

Landsstýrið kunngjørdi nýggja leistin fram móti fullveldinum á tíðindafundi í Tinganesi 2. november í fjør. Men kortini váttað bæði Sten Ryd Larsen, skrivstovustjóri í danska forsætisráðnum, og Herluf Sigvaldsson, stjóri á uttanlandsdeildini í Tinganesi, at fundurin teirra millum fríggjadagin var tann fyrsti um nýggja sjálvstýrisleistin.

Herluf Sigvaldsson vísir á, at løgmaður og danski forsætisráðharrin hava ábyrgdina av samráðingunum, og tí eru tað teir, ið skulu gera tær viðmerkingar, ið skulu gerast.

Tað hevur hvørki eydnast at fáa fatur á Anfinn Kallsberg, løgmanni, ella danska forsætisráðharranum, Poul Nyrup Rasmussen. Men Høgni Hoydal, varaløgmaður og landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, sigur, at ongar samráðingar hava verið – heldur ikki fríggjadagin.

– Samrøður hava leingi verið millum báðar partarnar, men talan hevur ikki verið um samráðingar. Tað stendur púra greitt, sigur Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal vísir á, at samskiftið millum landsstýrið og donsku stjórnina er í trúnaði, og tí fæst ikki meira at vita frá honum.

# Creamy á konsertferð til Føroya

KONSERFERÐ
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 10. februar verður konsert við hálvføroysku gentuduettini, Creamy í ítróttarhøllini í Runavík. Um nóg stór undirtøka verður, verður skipað fyri eykakonsert sunnudagin 11. februar.

Herfyri kom Creamy út við nýggjari fløgu, ið nevnist »We got the time«. Á fløguni eru 12 løg, sum verða sungin á enskum máli. Tittullagið er úr filminum »Help I´m a fish«.

Fløgan lá longu eftir tveimum vikum sum nummar 2 á danska hittlistanum — tað var bara Beatles, ið kláraði seg betur. »We got the time« er longu seld í 140.000 eintøkum og fyri tað hava Creamygenturnar fingið 2 x platin.

Í fjør vár vóru Creamygenturnar á konsertferð



kring Danmark, har 700.000 fólk nýttu høvi at hoyra og síggja tær.

Nú tær hava givið út nýggja fløgu, eru tær aftur farnar at fyrireika næstu konsertferðina. Hesaferð er málbólkurin alt frá teimum smáu til tey vaksnu. Konsertferðin varðar frá februar til apríl – og fáa føroyingar sum sagt eisini

Úrvalið á konsertferðini hesaferð verður bæði við løgum úr fyrr útgávuni, »Creamy« og úr nýggjú útgávuni, »We got the time«. Help I’m a fisk, I Do I Do I Do, Krabbesangen, Æblemand, Little Kitty og nógv onnur av kendu løgunum.


VETRARTILBOÐ við Norrönu



Bilpakkar Føroyar - Danmark ella hinvegin

| | 4-koyggju kamar v. wc/bað | 2-koyggju kamar v. wc/bað | Luksus kamar |
|---|---|---|---|
| Bilur + 4 fólk | 3.640,- | 4.620,- | 6.940,- |
| Bilur + 3 fólk | 2.920,- | 3.660,- | |
| Bilur + 2 fólk | 2.210,- | 2.700,- | 3.860,- |

Fyrsta fráferð er fríggjadagin 13. oktober.

Frítíðaríbúðir/Summarhús:
Danland í 1 viku úr 4.995,-
2 vaksin & 2 børn í bili
Dansk Folkeferie í 1 viku úr 5.995,-

Hotel:
Hotel Excelsior í 1 viku - Keypmannahavn úr 3.795,-
fyri hvønn, við 2 ferðandi í bilinum
Park Hotel í 1 viku - Ålborg úr 3.350,-

SMYRIL LINE
E-mail: booking@smyril-line.fo
Tel 34 59 00
www.smyril-line.com